## Petur Pólson á Asfalt

Á Asfalt 2006 var ein av mest gjøgnumførdu konsertunum tann hjá Peturi Pólson. Hetta fer uttan iva at endurtaka seg, tá ið Petur Pólson aftur verður at hoyra á Asfalt í ár. Petur er navnframur í Føroyum sum yrkjari, tónleikari og í øðrum høpi. Hann var við í bólkunum Visible Fish og Clickhaze, men valdi so at fara aftur um tjaldið á mentanarpallinum fyri nøkrum árum síðani. Eftir at hava verið í dvala gav hann út væl umtóktu fløguna "Koma" á heysti í 2005 við sínum egna bólki. Limirnir í bólkinum hjá Peturi eru tó eisini navnframir og fevna um Eiler Hansen, Boga á Lakjuni, Una Árting, Knút H. Eysturstein og Niels Jákup í Jógvanstovu. Allir hava verið við til at mynda føroyska tónleikapallin seinastu árini. Petur spælir fólkakendan alternativan rokk og arbeiðir í løtuni við eini nýggjari fløgu, ið væntandi kemur út seinni í ár. Hoyrið ímeðan tónleikin av fyrstu fløguni á Myspace.com/peturpolson.

## Ung hava trupulleikar

Hagtøl í Danmark vísa, at nógv fólk í 30'árunum hava so mikið stórar sálarligar trupulleikar í gerandisdegnum, at tey kenna seg noydd til at leita sær hjálp frá sálarfrøðingum ella øðrum serkønum. Blaðið metroXpress skrivar, at nógv tey flestu av hesum ungu eru menn, sum hava trupulleikar við konuni ella unnustuni, men sum ikki fáa seg til at fara frá henni, eftir at tað fyrsta barnið er komið. Árliga hava 5.000 danskir menn tørv á hjálp.



*Myndin er tikin á bátafestivalinum í fjør, tá bátarnir í fagrasta veðri stevna inn í Oyrahavnina*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Ársins fyrsti bátafestivalur

**- Vit bjóða øllum at vera hjartaliga vælkomin til ársin fyrsta bátafestival, sum verður á Toftum leygardagin, sigur Bátafelagið á Toftum**

BÁTAFESTIVALUR
*Vilmund Jacobsen*

Leygardagin skipar Bátafelagið á Toftum fyri bátafestivali, og er hetta soleiðis triðja árið á rað, at fólk í Nes kommunu taka stig til eitt slíkt tiltak.

### Í Skálafirði

Lagt verður fyri í Skálafirði, har bátarnir samlast klokkan 13. Síðan verður farið at sigla úteftir Skálafjørðinum og út á Toftir.

Tá bátarnir, sum felagið vónar verða nógvir í tali hendan dagin, koma í Oyrarnar umleið klokkan 14.30, verður borðreitt við feskari suppu og onkrum aftur við til bátafólkið.

- Umstøðurnar í Oyrunum eru góðar, og har fáa bátarnir eisini landstreym, eins og trygdarnet verða útflýggjað. Vit syrgja eisini fyri, at vaktir fara at hava uppsýn við økinum, meðan stevnan varir, sigur felagið.

Bátafelagið hevur eisini útvegað økið til húsvognar, men tey, sum ynskja at hava húsvogn á festivalinum, mugu lata felagið frætta skjótast gjørligt.

### Ymiskt undirhald

Á stevnuøkinum verður ymiskt undirhald fyri børnum, eitt nú so hoppiborg, trampolin, skreiðibreyt og bilar.

Í fjør fingu fólk teir vælumtóktu festival-búffarnar, smyrjibreyð og pylsu, og soleiðis verður eisini hesaferð. Eisini kunnu fólk bíleggja sær rundstykkir til morgunin eftir, so ongum nýtist at fara svangur avstað aftur.

Meðan stevnan varir, kemur ferðafólkabáturin Viljin at sigla farleiðina Toftir-Strendur-Toftir og millum Toftir og Sund.

- Tey, ið kundu hugsa sær at ferðast á hendan hátt, kunnu lata Bátafelagið á Toftum frætta við at ringja á tlf. 222060. Bilur fæst eisini á Sund við at ringja á tlf. 888888, siga tey, sum standa aftanfyri Bátafelagið á Toftum.

### Dansiorkestrið

Tað er eingin bátafestivalur uttan tónleik og dans, og eisini her hevur felagið syrgt fyri, at harmonikutónar verða á festivaløkinum, eins og Dansiorkestrið fer at spæla til dans í tjaldinum, sum verður sett upp á stevnuøkinum.

- Vit bjóða øllum at vera hjartaliga vælkomin til ársin fyrsta bátafestival, sigur Bátafelagið á Toftum.



*Eins og í fjør, fara harmonikuleikarar aftur í ár at seta sín serstaka dám á bátafestivalin*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Tíðin setir krøv til tilbúgving:

# Sunleiv skal le



**Eftir at hava starvast hjá Postverki Føroya síðan 1982, har hann í nógv ár sat í heita stólinum hjá Postfelagnum, skiftir hann nú "hest" og fer í ein ikki kaldari stól hjá Skálafjarðar Sløkkiliði**

STARVSSKIFTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Skálafjarðar kommunala Sløkkilið (SKS), sum er felags sløkkiliðið hjá Nes kommunu, Sjóvar kommunu, Runavíkar kommunu og Funnings kommunu, hevur sett Sunleiv Højgaard í fulltíðarstarv sum brunaumsjónarmann.

Sunleiv skal hava dagligu umsitingina av SKS, meðan sløkkiliðið verður skipað við felags brunanevnd.

Petur Jacob Petersen (Dakko) er vegna Nes kommunu formaður í brunanevndini, og Sonni Johansen av Strondum er vegna Sjóvar kommunu næstformaður.

Upprunaliga vóru tað kommunurnar við Skálafjørðin, sum í 1974 gjørdu av at skipa eitt felags sløkkilið, sum fekk navnið Skálafjarðar Sløkkilið.

- Tá varð nakað av útgerð keypt og plaserað ymsastaðni kring fjørðin. Í dag eru 47 sløkkiliðsmenn knýttir at skipanini, og hesir eru spjaddir í ymsum bygdum í økinum, har størri og smærri støðir eru, sum hýsa útgerðini, sigur Sunleiv Højgaard, sum eisini hevur verið sløkkiliðsmaður í mong ár.

Formaðurin í brunanevndini hjá kommununum, Petur Jacob Petersen, sigur, at brunanevndin og kommunurnar hava sæð í eyguni, at krøvini innan tilbúgving alsamt gerast størri.

- Tí er neyðugt at fáa hetta økið so væl skipað sum tilber, sigur hann.

Petur Jacob vísir á, at felags sløkkiliðið hevur virkað væl øll árini og hevur gjørt eitt stórt arbeiði.

- Tá óhapp eru, eru tað mong, sum hava sannað og